Lions Eysturoy:

Stuðlar eldrasambýlum og fornminnum

Trý eldrasambýli í Eysturoy fingu hvør sína lyft, og Fuglafjarða Fornminnisfelag fekk 15.000 krónur sum ískoyti til liðugtgerð av Høvdahúsunum

STUÐUL
Vilmund Jacobsen

Á eini samkomu á Muntra í Fuglafirði nakað herfyri handaði Lions Eysturoy trígggjar lyftir til trý eldrasambýli í oynni, nevniliga býlini á Eiði, Skála og Fuglafirði. Felagið handaði eisini Fuglafjarða Fornminnisfelag ein kekk uppá 15.000 krónur.

Formaðurin í Lions Eysturoy, Harley Joensen, sigur, at felagið ynskti at geva býlunum eina gávu, og á fundi við umboð fyri stovnarnar kom fram, at tey ynsktu sær hesar lyftir, sum tey nú hava fingið. Fuglafjarða Fornminnisfelag hevði søkt felagið um stuðul til eini gomul hús, sum felagið hevur tikið niður, bygt uppaftur og sett í stand.

Á samkomuni á Muntra vóru umboð fyri Lionsfelagið, eldrasambýlini og Fuglafjarða Fornminnisfelag, og tey fingu døgurða í sambandi við handanina.

Lions Eysturoy handaði Fuglafjarðar Fornminnisfelag ein kekk uppá 15.000 krónur

Lyftirnar

Harley sigur, at umboðini fyri eldrasambýlini fingu lyftirnar handaðar á staðnum.

– Hesar kunnu takast sundur í trígggjar partar, so tær fingust í bilin. Lyftirnar eru snøggar og lættar. Við lyftunum fylgdu eisini tvey sløg av seðlum til at lyfta fólk við. Umboðini fyri eldrasambýlini vóru serstakliga fegin um hesar lyftir, sum tey hava so nógv brúk fyri. Fólk kunnu eitt nú lyftast úr songini til uppí songina við hesum lyftunum, og tey kunnu lyftast í og úr einum koyristóli. Tey kunnu eisini lyftast upp at standa ella á wc.

Formaðurin í Lions Eysturoy leggur dent á, at tað var júst hetta slagi av lyftum, umboðini fyri eldrasambýlini ynsktu sær.

– Eg havi skilt tað soleiðis, at Hjálpitólamiðstøðin útvegar lyftir til fólk á eldrasambýlum, men hesar eru persónligar. Tað merkir, at tær skulu latast aftur til miðstøðina, tá ið tey gomlu og avlamnu doyggja, sigur hann.

Høvdahúsini

Harley sigur, at Lions Eysturoy ynskti eisini at stuðla Fuglafjarða Fornminnisfelag við 15.000 krónum.

– Felagið hevur keypt eini gomul hús, sum stóðu norðuri á Høvda. Hetta eru Høvdahúsini, tey kalla. Húsini eru tikin niður og sett uppaftur miðskeiðis í Fuglafirði. Peningurin er latin sum eitt ískoyti til liðugtgerðina, sigur hann.

Harley sigur, at aftur-vendandi málningaframsýningin, sum felagið á hvørjum ári hevur á páskum, gav rættiliga nógv í ár, og tí kann felagið geva hesar gávur.

– Framsýningin verður meira og meira vitjað, og hon gav meira á páskum í ár enn nakrantíð áður.

Lions Eysturoy hevur skipað fyri málningaframsýning í samfull 32 ár, og tey seinastu 29-30 árini hevur hon verið í Runavíkar skúla.

– Vit fáa 15% av søluni av málningunum umframt peningin fyri sølu av atgongumerkjum, sigur Harley.

Harley Joensen við eini av teimum trimum liftunum, sum Lions Eysturoy lat til trý sambýlið í oynni

Kappsigling

Næsta tiltakið, sum Lions Eysturoy skipar fyri, er kappsiglingin, sum verður seinnapartin í august.

– Vit skipa fyri einari kappsigling um árið og bátarnir, sum eru við í kappingini gjøgnum summarið, hava hetta tiltakið sum tað seinasta í árinum. Vit geva steyp til nr. 1, 2 og 3 og bjóða pannukøkur og kaffi. Í samband við kappsiglingina, selja vit eisini lutaseðlar, og her er høvuðsvinningurin ein frystiboks við mati, sigur Harley Joensen, sum fyri nøkrum vikum síðan tók við afturvali sum formaður í Lions Eysturoy. Formaðurin situr í eitt ár í senn, og hetta er so næsta skeiðið hjá Harley. Hinir nevndarlimirnir í felagnum eru Poul Godthard á Strondum, sum er kassameistari og Hjalgrím Poulsen, sum eisini býr á Strondum, er skrivari.

Jógvan Elias Joensen í Leirvík, sum var við til at stovna Lionsfelagið í Eysturoy í oktober 1969, ynskti ikki afturval sum skrivari.

Hugnakvøld í Kappróðrarneystinum á Glyvrum

Leygarkvøldið verður hugnakvøld við felagssangi, undirhaldi og góðum dansi í Kappróðrarneystinum á Glyvrum.

TILTØK
Vilmund Jacobsen

Felagssangur, undirhald, føroyskur viðskeri og dansur við Ragnari á Skipanesi.

Hetta er tað, sum er á skránni í Kappróðrarneystinum hjá NSÍ á Glyvrum leygarkvøldið.

Kvøldið byrjar kl. 20.00, og atgongumerkir eru at fáa hjá Eysturoyar Kunningarstovu og í Kiosk Vár í Saltangará. Kostnaðurin er 180 krónur.

NSÍ-dreingir til Liverpool

Stigtakari til umfatandi tiltakið er NSÍ.

Hetta er eitt innsavningartiltak í samband við, at dreingirnir hjá ítróttarfelagnum fara til Liverpool á vitjan í summar.

Ein slík ferð er kostnað armikil, og tí royndi NSÍ saman við teimum, sum skulu avstað og fordrum teirra at savna inn til Liverpool-túrin.

– Hetta er so startskotið til fleiri tiltøk av slíkum slagi, sigur NSÍ.

Føroyakvøld

Ætlanin er eisini at hava tvey Føroyakvøld í summar, eitt í juni og eitt í juli, og her er tað Eysturoyar Kunningarstova og NSÍ, sum standa aftanfyri.

– Hesi bæði kvøldini eru eisini ætlað útlendingum, sum vitja í Føroyum í summar, og tí verður nógvur og góður føroyskur viðskeri at fáa. Men øll eru sjálvsagt vælkomin, eisini føroyingar. Til tiltøkini í juni og juli verður eisini upplestur og felagssangur.

Tað verður Eysturoyar Kunningarstova, ið skal royna at fáa útlendsk ferðafólk, sum vitja í Føroyum, at møta í Kappróðrarneystinum at eta føroyskan viðskera og hugna sær.

– Hetta verður gjørt við at senda út brøv til hotellir, ferðaskrivstovur og kunningarstovur kring landið um Føroyakvøldini á Glyvrum, sigur NSÍ.

Dreingirnir, sum skulu til Liverpool, fara eisini at skera og selja kjálkar, lutaseðlar og tippa.

Kappróðrarneystið á Glyvrum verður karmur um tiltøkini leygarkvøldið komandi

Mynd: Vilmund Jacobsen

Nú leikar KT á

Einir 20 lærarar eru útbúnir sum KT-vørðar, síðani kunningartøkni kom inn um skúlagátt. Hesi árini hava teir arbeitt eftir eini fyribilsavtalu um røkt av KT, men nú vil Føroya Lærarafelag hava viðurskiftini hjá telduvørðunum endaliga uppá pláss

FÓLKASKÚLIN
Turið Kjølbro

– Vit hava brúkt nógva orku uppá savnsrøktarmálið og hava tí ikki verið inni á KT-málinum í langa tíð av tí sama, sigur Óli Holm, landsstýrismaður í skúlamálum

Fyri góðari viku síðani lýsti Føroya Lærarafelag við eini yvirlýsing, sum sigur, at verður eingin avtala um KT-økið í fólkaskúlanum gjørd innan stutta tíð, noktar Føroya Lærarafelag limum sínum at arbeiða sum KT-vørðir frá komandi skúlaári. Álit er skrivað um økið og tilmæli gjørd, men hóast tað eru samráðingar ikki byrjaðar enn.

Ábyrgdina av hesum eigur Mentamálastýrið, sigur Føroya Lærarafelag. Men KT-økið er aftur eitt dømi um eitt tvíbýtt øki, sum ymisk stýri varða av.

– Mentamálastýrið hevur gjørt starvslýsing av KT-økinum, sum felagið hevur sóknast eftir. Hin parturin, tað sum hevur við lønina hjá lærarum at gera, skal Føroya Lærarafelag samráðast við Fíggjarmálastýrið um. Sjálvsagt er tað álvarsamt, um eingin undirvísing verður í KT komandi skúlaár. Lat okkum vóna, at viðurskiftini koma uppá pláss áðrenn. Vit hava brúkt nógva orku uppá savnsrøktarmálið og hava tí ikki verið inni á KT-málinum í langa tíð av tí sama, sigur Óli Holm, landsstýrismaður.

– Og nógv tung mál leika eitt tungt mál er loyst, er tað næsta á borðinum.

At enn ein blokada rakar føroyska fólkaskúlan, er sjálvsagt óheppið, ikki minst fyri næmingarnar. Spurdur um, hví tað er so trupult at fáa øll viðurskifti, ið eru avleidd av nýggju fólkaskúlalógini, í rætt lag, sigur landsstýrismaðurin í skúlamálum, at hvørja ferð eitt tungt mál er loyst, er tað næsta á borðinum.

– Og nógv tung mál leika alla tíðina á. Fólkaskúlin er eitt ógvuliga stórt øki og tað vísir seg, at partarnir ikki altíð eru samdir um, hvussu tað ymiska skal loysast. Eftir mínum tykki koma aktuellu trupulleikarnir í, tí semjan frá 30. apríl 2000 viðvíkjandi savnsrøkt og KT-vørðum ikki verður tulkað eins frá avvarðandi pørtum. Uttan at fara í smálutir kann eg bert staðfesta, at bæði álitini eru skrivað sambært semjuni, men einki stendur í semjuni um, hvat síðan skal fara fram, og sum kunnugt liggur samráðingarheimildin hjá fíggjarmálastýrinum og ikki hjá Mentamálastýrinum. Í mínari tíð sum landsstýrismaður í mentamálum er játtanin til fólkaskúlan økt góðar 12 mió.kr. og umframt 2 mió. til sernámsfrøðiligan tørv. Hetta sæst aftur, nú komandi skúlaár verður lagt til rættis, at ikki fyrr enn nú er undirvísingarliga tilfeingið á nøktandi støði. Nýggjur tímabýtislykil er gjørdur, sum javnsetur allar skúlar sambært ásetingunum í galdandi fólkaskúlalóg, uttan mun til, um teir hava framhaldsdeild ella ikki, sigur Óli Holm.

Einir 20 lærarar eru útbúnir sum KT-vørðar, síðani kunningartøkni kom inn um skúlagátt. Hesi árini hava teir arbeitt eftir eini fyribilsavtalu um røkt av KT. Kostnaðurin fyri niðurskurðin til hesar útbúnu telduvørðarnar í núverandi fíggjarári er 1,8 mió. kr. ella 90.000 kr. til hvønn, sambært tølum frá landsstýrismanninum. Útbúgvingina hevur Mentamálastýrið goldið og lærararnir hava fingið løn í útbúgvingartíðini.

So leingi sum KT-økið í fólkaskúlanum ikki er fingið í rætt lag, er ongin grund til at seta í verk eina nýggja útbúgving av KT-vørðum, heldur Føroya Lærarafelag.

Frætt

Um vikuskiftið hevur fólkaskúladeildin í Mentamálastýrinum latið við seg koma. Í fráboðan til Føroya Lærarafelag verður sagt, at reglugerðir fyri flokslærarar, skúlavegleiðarar og KT-vørðar, sum felagið hevur sóknast eftir síðani 1998, eru gjørdar og koma felagnum um hendir beinanvegin. Sambært forkvinnuni í Føroya Lærarafelag er fólkaskúladeildin sinnað at gera alt tey eru ment, fyri at fáa viðurskiftini í rætt lag.

– Tað vísir seg, at tað einasta, sum veruliga munar og loysir seg, er, tá ið vit langa nevan í borðið, blokera ella hótta við blokadu. At heita á myndugleikarnar og bíðja teir avgreiða ymiskt, er eftir øllum at døma ikki nóg mikið, sigur Elsa Birgitta P. Petersen.

Nýggjan barnagarð til heystar

– At byggja barnagarð og vøggustovu er fyrsta fortreyt fyri at menna kommununa, sigur Heðin Zachariasen, borgarstjóri í Hvalvíkar kommunu

BARNAGARÐUR
Turið Kjølbro

Pláss verður fyri 45 børnum í nýggja barnagarðinum í Hvalvík, sum letur upp í heyst

Foreldur í Hvalvík og Streymnesi kunnu gleða seg, tí í heyst letur nýggjur barnagarður upp í Hvalvík. Pláss verður fyri 45 børnum í aldrinum 0 til 7 ár. Í hesum døgum verður í bløðunum sókt eftir leiðara, pedagogum og hjálparfólkum til stovnin.

Barnagarðurin, sum eisini fer at hava vøggustovu, verður bygdur nakað framman fyri skúlan. Kommunan hevur ognað sær alt økið heilt til skúlan, og ætlanin er, at økið burturav skal brúkast til annaðhvørt barnagarð og skúla.

Grivið er út fyri barnagarðinum. Tað er Norðsetur, sum hevur fingið uppgávuna at byggja barnagarðin, sum ætlandi skal verða klárur at taka í nýtslu 1. oktober. Hann verður í tveimum hæddum. Tann ovara verður uml. 255 fermetrar. Kjallarin verður nakað minni. Vøggustova og barnagarður verða í erva. Í fyrsta umfari verður bara ovara hæddin gjørd liðug. Hetta arbeiðið er mett at kosta 3 mió. kr. Innrættingin og annað í sambandi við barnagarðin, verður gjørt í samráð við leiðaran, sum verður settur.

Hvalvíkar kommuna hevur dagrøktarskipan og í henni eru 33 børn í løtuni. Hesi fara øll í nýggju vøggustovuna og barnagarðin. Umframt verður roknað við sjey børnum afturat til ta tíð. Sostatt 40 børnum. Hvalvíkar kommuna fer skjótt at taka støðu til, um ein frítíðarskipan fyri skúlabørn í 1. til 3. flokk eisini skal setast á stovn. Um so verður, kemur hendan at halda til í kjallaranum.

Í nógv ár hevur tað verið eitt ynski frá foreldrum í økinum, at barnagarður verður bygdur.

– Endamálið við at byggja ein barnagarð í bygdini er at skapa trivnað. Vit meta, at ein barnagarður er fyrsta fortreyt fyri at gera tað lokkandi at búgva í kommununi. Tískil fara vit eisini undir eina útstykking skjótt, sigur Heðin Zachariasen, borgarstjóri í kommununi.

Børn læra at verða brúkarar

– At vinna pengar er týdningarmiklari, enn trupulleikar, eitt nú etiólag hjá ungum gentum. Fá hugsa, at børn hava ilt við at skilja ímillum lýsingar og aðra upplýsing, sigur Laila Dåvøy í Barna- og familjumálastýrinum í Noregi

LÝSINGAR
Turið Kjølbro

Fleiri og fleiri lýsingar venda sær til yngstu brúkararnar, børnini. Tey verða lærd at gerast góðir brúkarar – av handilslívinum.

– Handilslig ávirkan á børn hevur nakað við virði at gera. Fá spyrja, hvørja ávirkan økt handilslig trýst hevur á sjálvsmyndina hjá børnum. At vinna pengar er týdningarmiklari, enn trupulleikar, eitt nú etiólag hjá ungum gentum. Fá hugsa, at børn hava ilt við at skilja ímillum lýsingar og aðra upplýsing. Tískil kunnu lýsingar, sum venda sær ímóti børnum, manipulera børn, sigur Laila Dåvøy í Barna- og familjumálastýrinum í Noregi.

Skúlin hevur eina týdningarmikla uppgávu at styrkja brúkarafrálæruna, heldur Laila Dåvøy.

– Tey ungu skulu gerast tilvitað um mál og ætlan við lýsingum, soleiðis at tey betur duga at fata keypitrýstið. Slík tilvitan má eisini umfata kynsspurningin, soleiðis at ungfólk læra at síggja, hvussu lýsingar spæla uppá kynsstereotýpur. Skúlin eigur at verða karmur um eina slíka tilvitan, sigur Laila Dåvøy.